# Taka tað heilt róligt at Paul Watson skal koma

*Løgreglan í Føroyum ger onki hóvasták burturúr, at Paul Watson nú sigur, at hann ætlar sær til Føroya. Men vit fylgja kortini væl við gongdini og so taka vit tað, sum tað kemur, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Sjálvandi fylgja vit væl við, hvat hendir rundanum okkum, sigur Jón Klein Olsen. Hann er nýliga tilnevndur varapolitiinspektørur og tað ger hann til leiðara á „útrykningsdeildini" á politistøðini í Havn. Tað kann væl henda, at hann fær eina stóra uppgávu longu í summar, nú tann illa gitni Paul Watson sigur, at hann ætlar sær aftur til Føroya*

Politiið í Føroyum fer ikki at gera nakað hóvasták burturúr hóttanunum hjá Paul Watson at koma aftur til Føroyar nú í summar.

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sigur, at politiið hevur altíð eygu og oyru opin fyri tí, sum fer fram rundanum okkum.

– Og sjálvandi fara vit eisini at fylgja við, um Paul Watson skuldi komið higar.

–Men nakrar serligar fyrireikingar, ella nakra dubbing verður ikki farið undir, hóast hann hóttir við at koma til Føroyar, sigur hann. Vit fylgja við og so taka vit tað, sum tað kemur.

Men tað skilst eisini á honum, at hann vil fyrst síggja Paul Watson her, áðrenn hann rættiliga trýr, at hann kemur.

–Seinast, hann var her, var í 1986. Tá lovaði hann at koma aftur ein mánaða seinni. Tað eru nú 14 ár síðani. Lat hann tí koma, áðrenn vit fara at gera nakað hóvasták burturúr. So fáa vit at síggja, hvat tað botnar í hesuferð og, hvussu leikur ferð.

– Talan kann eisini verða um, talan er um tóm orð, og at hann bara roynir at leggja eitt sálarligt trýst á okkum fyri at vita, um vit bakka og tað er ikki sagt, at nakað býr undir.

**Lovar ilt**

Men Jón Klein Olsen ásannar eisini, at sjálvandi kann álvari vera aftanfyri.

Og hann viðgongur, at, tær fráboðanir, sum koma frá hesun illa gitna umhvørvisverndarmanninum, boða ikki frá góðum, tí tær eru rættiliga ógvusligar.

–Tann, sum lesur fráboðanirnar hjá honum gjølliga, kann skjótt fara at ivast í, um maðurin yvirhøvur er rættsiktaður.

– Hann tosar um samanbrestir og hann er yvirhøvur rættiliga ágangandi í sínum fráboðanum

Vit, sum hava royndir av honum, seinast hann var her í 1986, vita, hvussu langt hann er til reiðar at fara. Og vit vita eisini, at hann er ein ótespiligur gestur at fáa, so tað eru vit í hvussu so er fyrireikaðir uppá, skuldi nakað lív blivið við honum hesuferð, tí vit læra sjálvandi alla tíðina av teimum royndum, vit gera.

Ta ferðina var hann burturvístur úr Føroyum í fimm ár. Tey fimm árini eru farin, so nú hevur hann slætt borð.

*Hann sigur, at tit skutu eftir honum bæði við høglbyrsu og við táragassi. tá ið hann var her seinast.*

–Tað er ikki rætt. Vit skutu gasspatrónir eftir honum, men tað brúka vit høglbyrsu til.

– Tað var ikki so, at vit skutu við skørpum.

Jón Klein Olsen sigur, at atsóknin hjá løgregluni í Føroyum ímóti Paul Watson, seinast hann var her, vardi í einar tríggjar tímar.

– Tá hevði Paul Watson trý fólk, sum tóku allar hendingarnar upp á film, eitt fólk stóð á brúgvatakinum, eitt frammi í gron og eitt afturi á hekkuni.

– Tey skuldu vera frá BBC.

– Men eftir av øllum at døma hava upptøkurnar ikki verið borðbarar, tí onki av tí sást aftur í sjónvarpinum.

–Tað einasta, sum varð víst í sjónvarpinum, var ein hálvvánalig sending sum CBS í Kanada gjørdi.

– Og har sóu vit m.a myndir av Paul Watson á brúnni, har hann rópar „Mayday, Mayday" í ein sendara og biðjur um hjálp, tí hann verður álopin av galnum politistum við maskinbyrsum.

–Men har ger hann tað mistak, at á teimum myndunum síggja vit eina oyggj í baksýninum, men hon er skógarklødd heilt oman í sjóvarmálan. So vit vita í hvussu so er, at myndin kann ikki vera úr Føroyum.

– Men tað vita fólk aðrastaðni frá kanska ikki.

Hann ger eisini tað mistak, at hann gevur upp, hvar hann er staddur.

– Men hvussu tú so vendir og snarar tær á tí knattstøðuni, kanst tú ikki fáa eina oyggj í baksýnið.

*Men hvat fer nú at henda, um hann fer at royna at forða fyri grindadrápi*

– Tað er ógvuliga ringt at siga nú, hvat vit fara at gera í eini ávísari støðu.

Vit skulu eisini taka tað fyrivarni, at hann fylgir gjølla við í bløðum og fjølmiðlum annars, tí hann er fjølmiðlamaður burturav.

– So vit fara í hvussu so er ikki at avdúka taktikkin frammanundan, sigur Jón Klein Olsen.

# Ikki nógv broytt seinastu 20 árini

*– Eg haldi ikki at lógarbrotini í Føroyum eru økt í tali sum so, seinastu árini, sigur Jón Klein Olsen, sum er blivin varapolitiinspektørur*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Gongdin í seinastu hevur verið keðilig. Men vónandi broytist gongdin aftur.

Sigur Jón Klein Olsen á politistøðini í Havn.

Hann er stutt síðani útnevndur til varapolitiinspektør, ístaðin fyri Suna Vinther, sum herfyri fór frá fyri aldur. Sostatt er hann leiðari á „útrykningsdeildini" politistøðini-tað eru politistarnir í eyðkennisbúna.

Harumframt er hann varaleiðari hjá Una Vestureið, sum er politiinspektørur.

Hin deildin á politistøðini er kanningardeildin, ella kriminaldeildin, har Bergleif Brimvík er leiðari.

Jón Klein Olsen fór á politistaskúla í 1978 og kom til Føroyar at arbeiða sum politistur í 1981.

Síðani hevur hann arbeitt her, uttan eitt stutt skifti, tá ið hann varð sendur til Jugoslavia, sum var.

**Ikki nógv broytt**

Hesi næstan 20 árini, Jón Klein Olsen hevur verið politistur, hava verið størstu uppgangstíðir og ringastu niðurgangstíðir í Føroyum nakrantíð.

Men hóast tíðirnar hava verið ógvuliga skiftandi, heldur hann ikki, at kriminaliteturin er nógv øktur.



*– Eg haldi ikki, at lógarbrotini eru so nógv økt í tali seinastu árini Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur*

–Tá ið tíðirnr versna, eru tað nógv sum eru bangin fyri, at tað fer at elva til fleiri lógarbrot. Men tað gjørdi tað ikki hjá okkum í nítiárunum.

Men Jón Klein Olsen sigur, at tað gongur nógv upp og niður við lógarbrotum.

– Tað býr so lítið fólk í Føroyum, og hagtøl broytast øgiliga skjótt, tá ið tað er smá tøl, vit arbeiða við.

So tað ber ikki til at koma til ov avgjørdar niðurstøður, hóast tølini fyri eitt ávíst slag av lógarbrotum broytast nógv frá einum ári til eitt annað, tí tað skal sera lítið til at broyta hagtølini.

Hann ivast eisini í, um kriminaliteturin er øðrvísi nú, enn hann hevur verið.

–Í síðstuni hevur gongdin verið keðilig.

– Men eisini tað gongur upp og niður og vit kunnu bara vóna, at hetta ikki eru tekin um, at kriminaliteturin yvirhøvur er blivin harðari, tí tað vóru eisini onkur stór mál fyrr.

Hann minnist eitt nú bankaránið í Kollafirði og á Norðskála og innbrotið í Tinganesi, tá ið ein ørgrynna av brennivíni varð stolið.

Men tað er í hvussu so er eitt, sum ikki slepst undan. Og tað er, at í seinastuni eru lógarbrotini, har børn eru misbrúkt, økt munandi í tali.

–Ja, tað er øguliga skelkandi, ásannar Jón Klein Olsen. Men hann veit ikki, hvussu tað ber til, at lógarbrotini eru blivin so nógv fleiri nú á døgum.

– Tað verður aldrin til annað enn gitingar.

– Støðan kann vera, at hesi lógarbrotini hava altíð verið, men at fólk eru blivin meiri tilvitað um tey og gera meiri av av melda.

– Talan kann eisini vera um, at tey, sum hava verið fyri slíkum ágangi, fáa størri dirvi at melda, táið tey hoyra um onnur mál, har fólk verða dømd fyri líknandi lógarbrot.

Og tað kann eisini verða, at tey í veruleikanum eru økt í tali.

Sjálvur heldur Jón Klein Olsen, at tað kann vera, at tað hava ikki verið so nógv lógarbrot av hesum fyrr.

–Fyrr vóru húsini nógv smærri.

– Húskini vóru eisini størri, við fleiri ættarliðum undir sama taki.

– Fólk livdu tætt saman, ofta fleiri sama rúmi, at tað lá kanska ikki so væl fyri at fremja hetta slagið av lógarbrotum.

Nú eru húsini nógv størri, húskini smærru, so umstøðurnar eru nógv broyttar.

– Men hetta verður so ikki annað enn gitingar, heldur Jón Klein Olsen.



# Mótmæla óskilinum við sjúkraflutninginum

*Klaksvíkar býráð mótmælir nú harðliga støðuna hjá sjúkraflutninginum hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Týsdagin steðgaði ein sjúkrabilur upp, meðan hann var úti í neyðsendarørindum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Klaksvíkar býráð mótmælir nú harðliga støðuna hjá sjúkraflutningstænastuni hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Týsdagin steðgaði ein sjúkrabilur í Klaksvík upp, tá hann var á veg til eitt ferðsluóhapp, har ein 14 ára gamal drongur var yvirkoyrdur.

– Henda ótolandi støða tekur grundarlagið undan trygdini, sum hetta vælvirkandi sjúkrahús eftir røttum skal vera fyri sínar brúkarar, skrivar Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík, í brævi, sum varð sent Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismanni, mikudagin.

Sjúkrabilurin breyt ein aksil, og hin sjúkrabilurin í Klaksvík var á verkstaði, og tí mátti skaddi drongurin flytast á sjúkrahúsið í persónbili.

Tveir sjúkrabilar eru í Klaksvík, men báðir eru gamlir og slitnir. Annar stendur nú við brotnum aksli, meðan hin javnan er av oynni í sjúkraørindum. Tí stendur ein Mazda-vøruvognur klárur at rykkja út, um okkurt er áfátt.

**Mugu skifta út beinanveg**

Klaksvíkar býráð sigur, at Almanna- og Heilsumálastýrið hevur fingið fleiri áheitanir um sjúkraflutningstænastuna hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, men at einki er hent í málinum hóast tað.

– Hvørki Klaksvíkar býráð ella Almanna- og Heilsumálastýrið kunnu standa og hyggja at, meðan tílíkt óskil, sum hóttir okkara trygd, fer fram, skrivar Jógvan við Keldu í brævinum.

Hann sigur, at Almanna- og Heilsumálastýrið beinanvegin eigur at taka neyðugu stigini til, at rættlag kemur á sjúkraflutningstænastuna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Klaksvíkar Sjúkrahús fær um stutta tíð ein nýggja sjúkrabil, men tað heldur Klaksvíkar býráð als ikki er nøktandi. Býráðið mælir til, at báðir sjúkrabilarnir verða skiftir út í stundini.



*Sjúkrabilarnir í Klaksvík eru gamlir og slitnir, og týsdagin breyt annar teirra ein aksil, meðan hann var úti í neyðsendarørindum. Mynd: Bárður Klakstein*

# Framsýning í Suðuroy

*11. og 12. mai verður stór og fjølbroytt framsýning á Flakavirkinum á Tvøroyri*

Hósdagin og fríggjadagin 11. og 12. apríl skipar Kjølbro Heilsøla fyri stórari framsýning í matstovuni á flakavirkinum á Tvøroyri. Frá tí at heilsølan byrjaði sítt virksemi, hevur tað verið heilt natúrligt at bjóða fiskiflotanum alla ta vøru og útgerð, sum hoyrir skipum til. Hetta hevur so ført við sær, at Kjølbro Heilsøla er blivin ein leiðandi heilsøla tá tað snýr seg um fiskiflotan. Á framsýningini, sum er meira ætlað sjófólki, reiðaríum, virkjum og handlum, verður nógv at síggja. Av tí at Kjølbro í 99 fekk umboð uppá tað heimskendu oljuna TEXACO, verða sjálvandi vørur frá Texaco at síggja á hesari framsýning. Kjølbro fekk eisini fyrst í 2000 umboð uppá 66 Norð. Hetta er eitt vælkent íslendskt merki, sum selir oljuklæði, dressir, arbeiðsklæði, trygdarskógvar og nógv, nógv annað. So 66 Norð verður eisini at síggja á framsýningini. Umframt olju og klæði til vinnulívið, kemur Kjølbro eisini at vísa fram knívar frá Frost, húkar frá Mustad, styvlar frá Bekina og nógv, nógv annað. Í stuttum tíðindaskrivi frá Kjølbro verður sagt, at opið er báðar dagarnar frá kl. 17.00 til 21.00.



# Bretar vitja Atlantsflog

*Mikudagin kom ein tyrla hjá bretska felagnum Bristol Helicopters í Vágar. Ferðamenninir hava fundast við leiðsluna í Atlantsflogi*

Leiðslan í Atlantsflogi hevur um dagarnar fundast við fólk, sum komu til Føroya við eini bretskari tyrlu mikudagin.

Hóast stjórin í Atlantsflogi, Magni Arge, ikki vil siga nakað um, hvat fundast hevur verið um, er ymiskt, sum bendir á, at talan er um eitt møguligt samstarv í frálandavinnu.

Tað einasta, Magni Arge vil siga, er, at samband hevur verið millum Atlantsflog og hesar menninar síðan 1996, og ein avkláring er nærri nú enn nakrantíð. Hann vil tó ikki siga, hvat tann avkláringin er, ella hvat tosað hevur verið um.

Tó váttar hann, at menninir komu við eini tyrlu hjá Bristol Helicopters.

Fremmandamenninir fóru avstað aftur við flogfarinum hjá Atlantsflog til Aberdeen í gjárkvøldið.

ej


Mammudagur
á Restaurant Hafnia

Sunnudagin 14. mai
frá kl. 12.00 - 16.00

- øll familjan út at eta -

SUNNUDAGSDØGURÐI:
Aspargessuppa
Heimabakað breyð afturvið
Piparbúffur við grønmeti,
pommes frites og piparsós
Íslagkøka
3rættir ..... bert148,-

Børn: ½ prís
Eisini er serlig barnamatskrá!

DØGURÐA BUFFÉT
• Aspargessuppa
• Fleiri leskiligir fiskarættir
• Kjøt- og pastarættir
Flótt:
• Oksaháryggur
• Lambstjógv
• Fleskasteik
• Stokt fiskaflak
Eplir, grønmeti og sósir afturvið
• Vælsmakkandi køku- og dessertborð
Etið av øllum ...
bert148,-

Frá kl. 18.00 - 21.30
NÁTTURÐA BUFFÉT
sum rættirnar í døgurðabuffétini
bert148,-



A LA CARTE
Stórt úrval av búffum, flógvum
og køldum rættum og dessertum

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33
HOTEL HAFNIA